Løgmálaráðið

Dagfesting:	28.11.2025
Mál nr.:	25/23488
Málsviðgjørt:	MV/NF
Ummælistíð:	08.10.2025- 05.11.2025
Eftirkannað:	08.11.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli
(Heimild til kommunur at yvirvaka serliga útsett øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 178 frá 17. desember 2020 um yvirvøku við vakmyndatóli, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Aftan á § 6, men áðrenn yvirskriftina yvir § 7, verður sett:

"**§ 6 a.** Fyri at økja um trygdina á serliga útsettum støðum í kommununi, kann kommunustýrið í samráð við politiið og eftir tilmæli frá politinum, yvirvaka gøtu, veg, pláss ella líknandi øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli.
S*tk. 2.* Tilmælið frá politinum er galdandi í tvey ár.
Stk. 3. Upptøkur fevndar av stk 1 kunnu einans gevast víðari til politiið til tess at politiið kann kanna og avdúka álvarsom lógarbrot. Upptøkur fevndar av stk. 1 kunnu viðgerast av øðrum enn politinum, um hetta er neyðugt í samband við ítøkilig revsimál.
Stk. 4. Upptøkur fevndar av stk. 1 skulu strikast í seinasta lagi 30 dagar eftir upptøkuna.
Stk. 5. Kommunan, sum setur upp vakmyndatól sbrt. stk. 1, er dátuábyrgdari."

2. Í § 9, stk. 1 verður "sbrt. § 8" broytt til: "sbrt. §§ 6 a og 8".

3. Í § 10, stk. 1 verður aftan á "§ 2," sett: "§ 6 a, stk. 1, 3 og 4,".

§ 2

Landsstýrisfólkið leggur í løgtingsárinum 2030 fram løgtingslógaruppskot um endurskoðan av hesi løgtingslógini.

§ 3

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Løgtingið hevur samtykt uppskot til samtyktar og heitt á landsstýrið um at fyrireika og leggja fyri Løgtingið lógaruppskot at loyva kommununum at seta upp vakmyndatól á serliga útsettum støðum í býarlívinum. Sí løgtingsmál nr. 69/2023.

Í galdandi løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli er ikki heimild hjá kommunum at yvirvaka øki við almennari ferðslu við tí endamáli at økja um trygdina og fremja tryggleika í kommununi.

Skulu kommunur hava møguleikan at seta upp vakmyndatól og yvirvaka øki, sum verða nýtt til vanliga ferðslu fyri at økja um trygdina, er neyðugt at fáa slíka heimild til vegar í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli. Tí verður hetta uppskotið lagt fyri Løgtingið.

1.2. Galdandi lóggáva

1.2.1 Løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli

Endamálið við løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli er at tryggja, at persónar ikki eru fyri óneyðugari og inntrívandi privatari yvirvøku í almenna rúminum. Løgtingslógin tekur samstundis neyðug atlit til, at tað í ávísum førum kann vera neyðugt at yvirvaka fyri m.a. at økja um tryggleikan og at fyribyrgja lógarbrotum. Løgtingslógin loyvir sum útgangsstøði ikki privatum við vakmyndatóli at yvirvaka økir, sum verða nýtt til vanliga ferðslu. Tó eru undantøk, sum m.a. loyva yvirvøku av bensinstøðum og peningasjálvtøkum.

Løgtingslógin fevnir um yvirvøku av persónum.

Sambært galdandi løgtingslóg eru almennir myndugleikar ikki fevndir av forboðnum fyri yvirvøku av øki við vanligari ferðslu.

Almennir myndugleikar, t.d. kommunur, kunnu við vakmyndatóli yvirvaka øki, sum vanlig atgongd er til, t.d. inngongdir, móttøkuhølir, bygningar og ognir fyri at fyribyrgja stuldri og herverki, og við tí endamáli at verja ognir hjá kommununi. Tað er tá ein treyt, at minni inntrívandi fyriskipanir ikki eru nóg mikið, at yvirvøkan er avmarkað og ikki upptekur meira enn neyðugt fyri at røkka endamálinum. Harumframt kunnu almennir myndugleikar við vakmyndatóli yvirvaka økir, sum vanlig atgongd er til, um tað t.d. er sambæriligt við reglur ásettar í dátuverndarlógini, revsilógini og í samsvari við fyrisitingarrætt og arbeiðsrætt.

Hvørt almennir myndugleikar kunnu yvirvaka almenn øki við vanligari ferðslu fyri at økja um tryggleikan, skal tó metast eftir reglum, sum eru galdandi fyri almennar myndugleikar. Almennir myndugleikar eru bundir av krøvum um sakligheit, legalitet, og vanligum reglum um góðan fyrisitingarligan sið. Dátuverndarlógin ásetir harumframt krøv um sakligheit, proportionalitet og reglur um viðgerðartrygd, sum skulu vera loknar.

Yvirvøka og viðgerð av persónupplýsingum í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli, sum almennur myndugleiki stendur fyri, er fevnt av løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónsupplýsingum (dátuverndarlógini). Tað merkir, at tá yvirvøka av persónum fer fram við vakmyndatóli, er talan um viðgerð av persónupplýsingum. Er talan um yvirvøku av møguligum lógarbrotum og møguligum revsiverdum viðurskiftum, er talan um viðgerð av viðkvæmum persónupplýsingum.

Ein almennur myndugleiki skal hava heimild í lóg at viðgera persónligar upplýsingar. Í galdandi løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli er ikki heimild hjá kommunum at yvirvaka øki við vanligari ferðslu við tí endamáli at økja um trygdina á útsettum støðum við vanligari ferðslu.

Ásett er í løgtingslógini, at tann, sum setur upp vakmyndatól, skal boða Dátueftirlitinum frá hesum. Dátueftirlitið førir eina skrá yvir tól fevnd av § 1 í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli. Dátueftirlitið hevur eftirlit við, um myndugleikar, fyritøkur o.o. viðgera persónupplýsingar í samsvari við dátuverndarlógina. Dátueftirlitið skal ikki geva loyvi til yvirvøku við vakmyndatóli, men Dátueftirlitið kann vegleiða um dátuvernd í sambandi við yvirvøku. Gerst Dátueftirlitið í samband við eina fráboðan varugt við, at eitt vakmyndatól er greitt í ósamsvari við løgtingslógina, skal Dátueftirlitið gera vart við hetta.

Politiið hevur eftirlit við, um løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli er hildin. Tað hevur m.a. við sær, at um ein gerst varugur við, at eitt vakmyndatól er sett upp í ósamsvari við løgtingslógina, er hetta eitt brot, sum skal meldast til politiið, sum síðani kannar málið.

Harumframt er ásett í løgtingslógini, at almennir myndugleikar, eins og privat, sum við vakmyndatóli yvirvaka støð ella høli, sum vanlig atgongd er til, skulu skelta ella á annan hátt týðiliga gera vart við yvirvøkuna.

1.2.2 Dátuverndarlógin
Eins og omanfyri er víst á, er viðgerð av persónupplýsingum við vakmyndatóli viðgerð, ið er fevnd av dátuverndarlógini.

Ein kommuna skal sambært dátuverndarlógini hava heimild til viðgerð av persónupplýsingum.

Heimild til viðgerð av vanligum upplýsingum, t.e. ikki viðkvæmum persónupplýsingum, er at finna í § 8 í dátuverndarlógini. Ein kommuna kann sambært § 8, stk. 1, nr. 5 í dátuverndarlógini viðgera vanligar persónupplýsingar, um viðgerðin er neyðug til tess at røkja uppgávur, sum liggja innan kommununnar myndugleikaútinnan.

Viðgerð av møguligum lógarbrotum og revsiverdum viðurskiftum er viðgerð av viðkvomum upplýsingum sambært § 11, stk. 1 í dátuverndarlógini. Viðgerð av viðkvæmum upplýsingum kann bert fara fram, um heimild er fyri hesum í §§ 12-14 ella 18-19 í dátuverndarlógini.

Sambært § 12, stk. 1, nr. 2 er viðgerð av viðkvæmum upplýsingum loyvd, um viðgerðin er heimilað í lóg.

Umframt heimild í lóg at viðgera viðkvæmar upplýsingar, skal viðgerðin vera í samsvari við meginreglurnar í dátuverndarlógini.

Tá persónupplýsingar verða viðgjørdar, er tað ein fortreyt, at meginreglurnar í § 7 í dátuverndarlógini verða fylgdar. Meginreglurnar seta krøv um:

1) Lógligheit, rímiligheit og gjøgnumskygni.
2) Endamálsavmarking.
3) Dátuminimering.
4) Rættleika.
5) Goymsluavmarking.

6) Integritet og trúnað.

Ad 1) Lógligheit, rímiligheit og gjøgnumskygni, § 7, stk. 1, nr. 1.
Henda áseting ásetur meginreglurnar um proportionalitet og løggildi. Lutfall skal vera millum heimild og inntriv, og inntriv í rættindi hjá tí einstaka skal ikki vera tilvildarligt ella óskipað. Meginreglan hevur við sær, at viðgerðin ikki skal gera størri inntriv í rættindi hjá tí einstaka enn neyðugt er í mun til endamálið.

Ad 2) Endamálsavmarking, § 7, stk. 1, nr. 2.
Meginreglan ásetur, at persónupplýsingar kunnu savnast til eitt nágreiniligt tilskilað og heimilað endamál, og at savnaðar persónupplýsingar ikki frítt kunnu viðgerast til onnur endamál enn tað ella tey endamál, sum persónupplýsingarnar vórðu savnaðar til.

Ad 3) Dátuminering, § 7, stk. 1, nr. 3.
Meginreglan hevur m.a. við sær, at nøgdin av persónupplýsingum, sum verða viðgjørdar, altíð eigur at verða so lítil sum møguligt fyri at røkka endamálinum við viðgerðini.

Ad 4) Rættleiki, § 7, stk. 1, nr. 4.
Meginreglan ásetur, at dátuábyrgdarin skal tryggja, at tær persónupplýsingar, sum verða viðgjørdar, eru rættar og nøktandi dagførdar.

Ad 5) Goymsluavmarking, § 7, stk. 1, nr. 5.
Ásetingin hevur við sær, at persónupplýsingar ikki skulu goymast longur enn neyðugt.

Ad 6) Integritet og trúnað, § 7, stk. 1, nr. 6.
Ásetingin hevur við sær eina skyldu fyri dátuábyrgdaran at nýta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig, undir hesum fysisk, tiltøk fyri at verja integritetin hjá tí einstaka og verja persónupplýsingar um skrásetta. Tað merkir m.a., at dátuábyrgdarin skal tryggja, at óviðkomandi ikki hava atgongd til upplýsingarnar, og at skipanirnar eru tryggar at nýta.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at geva kommunum heimild at yvirvaka gøtu, veg, pláss ella líknandi øki, sum er serliga útsett og verður nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli.

Fyri at økja um trygdina á serliga útsettum støðum í kommununi, kann kommunustýrið í samráð við politiið og eftir tilmæli frá politinum, yvirvaka gøtu, veg, pláss ella líknandi øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli.

Endamálið við uppskotinum er eisini at tryggja, at yvirvøkan ikki verður ov inntrívandi í frælsið og privatlívið hjá einstaka borgaranum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Almennir myndugleikar eru ikki fevndir av forboðnum fyri yvirvøku av øki við vanligari ferðslu. Hvørt almennir myndugleikar kunnu yvirvaka almenn øki við vanligari ferðslu fyri at økja um tryggleikan, skal metast eftir reglum, sum eru galdandi fyri almennar myndugleikar.

Tað verður mett ivasamt, um ein kommuna við heimild í kommunufulltrúini kann yvirvaka øki við vanligari ferðslu við vakmyndatóli við tí endamáli at økja um trygdina hjá borgarunum. Mett verður ikki, at slík yvirvøka kann fara fram við heimild í § 8, stk. 1, nr. 5 í

dátuverndarlógini, tí talan er ikki um viðgerð, sum er neyðug til tess at ein kommuna kann røkja eina uppgávu, fevnd av kommununnar myndugleikaútinnan.

At fremja tryggleika í almenna rúminum verður sum útgangsstøði mett at vera ein uppgáva, sum liggur hjá politinum. At forða fyri og avdúka lógarbrot, tá hesi eru framd, verður somuleiðis mett at vera ein uppgáva, sum politiið varðar av.

Størsta kommunan í Føroyum hevur í fleiri umførum víst á, at tørvur er á at yvirvaka øki við vanligari ferðslu í náttarlívinum. Tað hava verið tilburðir av harðskapi í miðbýnum um náttina, sum hava gjørt, at borgarar hava kent seg ótryggar. Harumframt eru tað økir í miðbýnum, har borgarar, undir hesum børn og ung, ikki kenna seg trygg at ferðast í dagtímunum.

Hóast tað at fremja tryggleika ikki vanliga verður mett at vera ein uppgáva, sum ein kommuna varðar av, so verður mett, at kommunur í ávísan mun hava ábyrgdina av at innrætta umhvørvi og seta átøk í verk í kommununi soleiðis, at til ber hjá borgarum at ferðast trygt á almennum støðum í kommununi. Ein kommuna kann millum annað seta í verk skipanir við náttarravnum ella vaktum, fyri at økja um tryggleikan í náttarlívinum.

Við uppskotinum verður nýggj áseting sett inn í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli, sum gevur kommunum heimild at seta upp vakmyndatól at yvirvaka serliga útsett øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu. Endamálið er at økja um tryggleikan hjá borgarum á serliga útsettum støðum, sum verður nýtt til vanliga ferðslu.

Verður tað mett, at tað ikki eru onnur minni inntrívandi átøk, sum kunnu setast í verk fyri at økja um tryggleikan á útsettum støðum, fær ein kommuna sambært uppskotinum heimild at seta upp vakmyndatól at yvirvaka serliga útsett støð støð við vanligari ferðslu.

Yvirvøka av persónum við vakmyndatóli er sum áður nevnt viðgerð av persónupplýsingum, og yvirvøka við vakmyndatóli av viðurskiftum, sum kunnu vera revsiverd, er viðgerð av viðkvæmum persónupplýsingum. Ein almennur myndugleika skal hava heimild at viðgera persónupplýsingar og viðkvæmar persónupplýsingar. At avdúka og uppklára lógarbrot er sum áður nevnt ikki ein uppgáva, sum kommunan varðar av. Ein kommuna kann tí ikki fáa atgongd til upptøkur av møguligum revsiverdum viðurskiftum.

Politiið hevur greitt frá, at upptøkur frá vakmyndatólum eru eitt gott og effektivt amboð hjá politinum at avdúka og fáa greiðu á møguligum lógarbrotum. Hóast sjálvur gerningurin ikki verður tikin upp, so kunnu upptøkur frá vakmyndatólum vera ein stór hjálp í kanningararbeiðinum hjá politinum, og gera tað skjótari hjá politinum at fáa greiðu á einum máli og eyðmerkja røttu gerningsfólkini. Um illgruni er um, at lógarbrot eru framd, og lógarbrotið ella slóðir, sum kunnu hava týdning fyri kanningararbeiði hjá politinum, eru á upptøkum frá einum vakmyndatóli, kann politiið fáa atgongd til upptøkurnar, um talan er um álvarsom lógarbrot.

Kanningar vísa, at yvirvøka við vakmyndatólum í sjálvum sær ikki fyribyrgir harðskapi ella onnur sløg av atgerðum, sum persónar fremja í sinnisrørslu. Yvirvøka við vakmyndatólum kann tó fyribyrgja lógarbrotum, sum eru meira løgd til rættis, sum t.d. herverk, innbrot og stuldur. So hóast heimild verður givin kommunum at yvirvaka við vakmyndatóli, so kann hendan ikki standa einsamøll. Tørvur er framvegis á nærverandi og sjónligum politii í almenna rúminum og tørvur er á, at átøk verða sett í verk at basa teimum trupulleikum, sum eru orsøkin til, at tað kann vera ótrygt hjá borgarum at ferðast í almenna rúminum.

Ein møgulig avleiðing av uppskotinum er, at lógarbrot, sum eru løgd til rættis, flyta seg til stað, har ongin yvirvaking við vakmyndatóli er.

Við uppskotinum verður ikki avmarkað, hvar vakmyndatól ítøkiliga kunnu setast upp og í hvørjum tíðarskeiði vakmyndatól kunnu taka upp. Tað er einstaka kommunan sum í samráð við politiið skal gera eina ítøkiliga meting av tørvinum og skal tryggja, at yvirvøkan er í samsvari við lóggávu annars, undir hesum vanligar fyrisitingarligar reglur og dátuverndarlógina.

Tað verður ásett sum treyt, at tá vakmyndatól verða sett upp, skulu hesi setast upp í samráð við politiið, sum út frá eini politifakligari meting skal gera tilmæli til kommununa, sum ynskir at yvirvaka øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli. Politiið hevur serligan kunnleika og førleika at meta um, hvar tað kann vera ótrygt á einum øki eitt ávíst tíðspunkt, og á hvønn hátt vakmyndatól kunnu vera við til at fremja tryggleikan. Tí verður ásett, at vakmyndatól, tá hesi verða sett upp, skulu setast upp í samráð við politiið, og at tilmæli frá politinum skal fáast til vegar, áðrenn avgerð verður tikin um at seta vakmyndatól upp.

Harumframt verður ásett, at tilmæli frá politinum er galdandi í tvey ár. Hetta fyri at tryggja, at tað ikki verður yvirvakað á økjum, sum tað ikki longur er grundarlag fyri at yvirvaka.

Eisini verður ásett, at upptøkurnar skulu strikast í seinasta lagi 30 dagar eftir upptøkuna.

Tá ið vakmyndatól verða fráboðað Dátueftirlitinum, skal tilmælið frá politinum verða hjálagt fráboðanini.

1.4.1. Endurskoðan av skipanini
Skipanin við yvirvøku á økjum við vanligari ferðslu eigur at verða endurskoðað um 5 ár.

Yvirvøka við vakmyndatóli í almenna rúminum er eitt inntriv í frælsið hjá tí einstaka at ferðast frítt og eitt inntriv í rættin hjá tí einstaka til privatlív. Tað er tí av týdningi at endurskoða hesa skipan fyri at tryggja, at skipanin riggar sum ætlað, at skipanin ikki verður nýtt í størri mun enn neyðugt, og at skipanin ikki verður nýtt í staðin fyri at seta onnur átøk í verk fyri at fremja tryggleikan og fyribyrgja lógarbrotum, sum gera tað ótrygt at ferðast í økinum.

Heimildin at seta upp vakmyndatól er ætlað at nýta í teimum førum, har tað ikki ber til at seta onnur átøk í verk fyri at fremja tryggleikan í økinum og skal tí nýtast við varsemi, fyri ikki at gera óneyðug inntriv í rættin hjá tí einstaka til privatlív og rættin hjá tí einstaka at vera í almenna rúminum uttan at vera fyri yvirvøku.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Hesi fingu lógaruppskotið sent beinleiðis til ummælis:
Brotsfrøðifelag Føroya
Dátueftirlitið
Etiska Ráðið
Fróðskaparsetur Føroya
Føroya Politi
Føroya Rættur
Kommunufelagið
MEGD

SSP-ráðgevingin

Uppskotið varð eisini lagt á almenna ummælisportalin hjá landsstýrinum.

Ummælistíðin var frá 8. oktobur til 5. novembur 2025.

Tá ið ummælisfreistin var farin, vóru ummæli komin frá Brotsfrøðifelag Føroya, Dátueftirlitinum, Etiska Ráðnum, Føroya Politi, Kommunufelagnum, Tórshavnar kommunu og SSP-ráðgevingini.

Brotsfrøðifelag Føroya greiðir í ummæli sínum frá, at tað er teirra serfrøðiliga meting, at vakmyndatól ikki er vegurin fram til tryggleika og frið á alfaravegi.

Brotsfrøðifelag Føroya vísir m.a. á, at kanningar hava víst, at vakmyndatól í sjálvum sær ikki fyribyrgja harðskapi og at kanningar benda á, at um ein vil hava minni harðskap á almennum støðum, skal ein ikki nýta pening og orku upp á vakmyndatól. Felagið vísir á, at amerikanskar og svenskar kanningar eisini benda á, at tað er ivasamt, hvussu væl vakmyndatól hjálpa við at uppklára lógarbrot, serliga um samanborið verður við kostnað og inntriv, sum tað ber við sær.

Løgmálaráðið hevur í uppskotinum víst á, at yvirvøka við vakmyndatóli í sjálvum sær ikki verður mett at vera nóg mikið til at fremja tryggleika í almenna rúminum. Onnur tiltøk mugu tí framvegis og frameftir fyriskipast fyri at skapa tryggleika í almanna rúminum.

Brotsfrøðifelag Føroya vísir á møguligar vansar við, at kommunur seta upp vakmyndatól á almennum støðum, og at hetta kann seta dik á, at føroyingar fáa sær enn fleiri vakmyndatól við hús. Sambært felagnum er tað onki, sum forðar fyri, at fleiri vakmyndatól verða sett upp fleiri og fleiri staðir, tá ongi krøv eru sett um, hvussu "serliga útsettir staðir" skulu verða valdir, annað enn politifakliga meting, eins og vandi kann vera fyri, at vakmyndatól ikki verða tikin niður, um yvirvøkan við vakmyndatóli ongan mun ger.

Løgmálaráðið skal vísa á, at tað í uppskotinum verða álagdar kommunum skyldur og ábyrgd at tryggja, at vakmyndatól einans verða sett upp, har tað verður mett neyðugt, og at tólini verða tikin niður, tá ið tað ikki longur er grundarlag fyri at yvirvaka eitt øki. Fyri at tryggja hetta, er ásett, at tilmælið frá politinum er galdandi í tvey ár. Kommunur skulu tí regluliga endurskoða tørvin á at yvirvaka almenn støð við vakmyndatóli. Umframt at lúka treytirnar, sum ásettar í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli, skulu treytir og krøv ásett í dátuverndarlógini haldast, tá talan er um viðgerð av persónupplýsingum og viðkvæmum persónupplýsingum.

Sambært ásetingum í galdandi løgtingslóg skulu øll vakmyndatól fráboðast Dátueftirlitinum. Slík fráboðan ger tað møguligt hjá myndugleikunum at fylgja gongdini við uppsetan av vakmyndatólum.

Um heimild verður givin kommunum at seta upp vakmyndatól, mælir Brotsfrøðifelag Føroya til, at byrjað verður við kanningum av nyttuni, áðrenn nakað tól er sett upp, soleiðis at til ber at bera saman eftir eina tíð. Kanningin eigur at fevna um fleiri viðurskiftir, m.a. hvørt vakmyndatól veruliga forða fyri harðskapi, hvørt tað verður tryggari, um fólk kenna seg tryggari, hvussu kommunur nýta heimildina, og hvussu politiið verður ávirkað av heimildini.

Løgmálaráðið metir, eins og Brotsfrøðifelag Føroyar vísir á, at kanningar eiga at verða gjørdar av nyttuni av, at vakmyndatól verða sett upp, og at tað hevði verið mest skynsamt, um

kanningar vórðu gjørdar, áðrenn tól verða sett upp, soleiðis at til ber at gera upp nyttuna av slíkum inntrivi. Kanningar sum feløg, útbúgvingarstovnar og stovnar annars gera, og sum uppskotið møguliga gevur slíkum stovnum høvi at fara undir, eru kærkomnar. Slíkar kanningar høvdu verið av stórum týdningi fyri ta eftirmeting, sum sambært uppskotinum skal gerast eftir 5 ár.

Brotsfrøðifelag Føroya tekur ikki undir við uppskotinum. Er tó undirtøka fyri at geva kommunum heimild at seta upp vakmyndatól, mælir Brotsfrøðifelag Føroya til, at ein brotsfrøðinevnd verður sett, og at § 6 a, stk. 1, í uppskotinum verður broytt, og ásett verður, at kommunustýrið í samráð við eina brotsfrøðinevnd og eftir tilmæli frá eini brotsfrøðinevnd, kann seta upp vakmyndatól. Somuleiðis verður mælt til, at ásett verður, at tilmælið frá brotsfrøðinevndini er galdandi í tvey ár. Harumframt mælir felagið til, at eitt nýtt stk. 2 verður sett inn, sum ásetur at *"Brotsfrøðinevnd er óheft. Í brotsfrøðinevnd sita brotsfrøðingar og løgreglumenn, ið landsstýrismaður velur eftir tilmæli frá løgregluni og Brotsfrøðifelag Føroya."*

Brotsfrøðifelag Føroya mælir til, at brotsfrøðingar eru við í serfrøðiligu metingini av, hvar tað kann vera ótrygt at ferðast, og á hvønn hátt vakmyndatól kunnu vera við til at fremja tryggleikan. Felagið metir tað undir øllum umstøðum vera skilagott at stovna eina brotsfrøðinevnd, har ið løgreglumenn, brotsfrøðingar og aðrir viðkomandi partar kunnu samstarva um týðandi brotslig og brotsfrøðilig viðurskifti.

Løgmálaráðið metir uppskotið um at seta á stovn eina brotsfrøðinevnd vera áhugavert. Hvørt ein slík nevnd eigur at verða skipað, og um kommunur í samráð við slíka nevnd kunnu seta upp vakmyndatól, er nakað, sum man í sambandi við endurskoðanina av skipanini, møguliga eigur at kanna nærri.

Løgmálaráðið metir, at Føroya Politi hevur innlit og kunnleika at meta um hesi viðurskifti í Føroyum, og mett verður ikki, at grundarlag er fyri at broyta ásetingar í uppskotinum hvat hesum viðvíkur.

Løgmálaráðið metir tað vera sera jaligt, at Brotsfrøðifelag Føroya bjóðar seg fram at ráðgeva kommunum um, hvussu tær kunnu fyribyrgja harðskapi og øðrum lógarbrotum, og fremja tryggleika. Vónandi fara kommunurnar at taka av hesum tilboði.

Dátueftirlitið vísir í ummæli sínum á, at verður uppskotið samtykt, fáa kommunur heimild at seta upp vakmyndatól at yvirvaka øki, har tørvur er á at fremja átøk fyri at økja um tryggleikan. Ein heimild, sum kommunur, sambært galdandi rættarstøðu, ikki hava í dag. Dátueftirlitið vísir á, at viðgerðargrundarlagið harvið er uppfylt. Dátueftirlitið vísir á, eins og í uppskotinum er víst á, at umframt ásetingar í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli skulu ásetingarnar í dátuverndarlógini eisini haldast.

Hvat viðvíkur dátuábyrgd vísir Dátueftirlitið á, at tað ikki framgongur beinleiðis av lógartekstinum, at tað er kommunan, ið er dátuábyrgdari fyri viðgerðina av persónupplýsingum, ið fer fram í sambandi við yvirvøkuna. Hetta framgongur av viðmerkingunum. Dátueftirlitið vísir í hesum sambandi til § 6, nr. 6 í dátuverndarlógini, ið ásetur, at ein dátuábyrgdari er *"Ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ein almennur myndugleiki, ein stovnur ella ein onnur eind, sum eina ella saman við øðrum ger av, til hvørji endamál og við hvørjum hjálpartólum persónupplýsingar kunnu viðgerast."*

Dátueftirlitið vísir á, at ivi kann taka seg upp um tað er kommunan ella politiið, ið er dátuábyrgdari sbrt. § 6, nr. 6 í dátuverndarlógini í hvørjum einstøkum máli. Dátueftirlitið mælir til, at tað framgongur beinleiðis av ásetingini, at tað er kommunan, ið er dátuábyrgdari.

Løgmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar og hevur broytt uppskotið samsvarandi viðmerkingunum frá Dátueftirlitinum. Hetta soleiðis at ivamál ikki er um, at tað er einstaka kommunan, sum setur upp vakmyndatól sambært § 6 a, stk. 1 í uppskotinum, sum er dátuábyrgdari.

Um endamálsavmarking vísir Dátueftirlitið á, at Dátueftirlitið er samt við viðmerkingunum hjá Løgmálaráðnum hvat hesum viðvíkur. Dátueftirlitið leggur tó áherðslu á, at um lógaruppskotið verður samtykt, og kommunur nýta heimildina í § 6 a í uppskotinum, kunnu persónupplýsingar bert viðgerast við tí fyri eyga at økja um tryggleikan. Um kommunan ynskir at seta upp vakmyndatól fyri at fyribyrgja innbroti, herverki og líknandi, so hevur kommunan heimild til tað sum er. Tann yvirvøkan skal tí vera nógv meira avmarkað og bert fevna um tær ítøkiligu inngongdirnar, ognirnar o.tíl., ið roynt verður at verja.

Dátueftirlitið vísir á, at í § 7, stk. 1, nr. 1 í dátuverndarlógini er ásett ein meginregla um lógligheit, rímiligheit og gjøgnumskygni. "Rímiligheit" merkir, at viðgerðin ikki má gera større inntriv í rættindi hjá tí einstaka enn neyðugt fyri at røkka endamálinum.

Dátueftirlitið vísir á, at ein meting um rímiligheit ikki bert skal gerast, áðrenn yvirvøkan verður sett í verk, men eisini leypandi – eitt nú tá ein ávís tíð er fráliðin. Um tað seinni vísir seg, at yvirvøkan onga praktiska nyttu hevur havt, kann tað vera ein ábending um, at tørvurin á yvirvøku ikki er til staðar, og at tað tískil ikki er rímiligt, at yvirvøkan heldur fram. Dátueftirlitið kann í slíkum førum koma til ta niðurstøðu, at viðgerðin ikki longur er rímilig og tí í ósamsvari við dátuverndarlógina. .

Í so fall skal viðgerðin steðga, hóast kommunan hevur heimild at seta vakmyndatól upp sbrt. nýggju § 6 a. Harumframt er í § 49 í dátuverndarlógini ásett, at í ávísum førum skal ein dátuábyrgdari gera eina avleiðingargreining um dátuvernd (Data protection impact assessment) áðrenn viðgerðin byrjar. Hetta er sbrt. § 49, stk. 2 nr. 3 galdandi, tá ið talan er um umfatandi og skipaða yvirvøku av alment atkomuligum øki.

Tað vil siga, at áðrenn yvirvøka sbrt. nýggju § 6 a kann setast í verk, skal kommunan gera eina avleiðingargreining sbrt. § 49 í dátuverndarlógini.

Løgmálaráðið takkar fyri útgreinandi viðmerkingarnar til uppskotið.

Hvat viðvíkur revsiábyrgd vísir Dátueftirlitið á, at tað í uppskotinum verður víst til § 10 í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli, ið ásetur, at brot á løgtingslógina kunnu revsast við sekt. Dátueftirlitið vísir á, at sbrt. § 10, stk. 5 í vakmyndatólslógini koma feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar undir revsiábyrgd eftir reglunum í kap. 5 í revsilógini. Í § 27, stk. 2 í revsilógini er ásett, at *"Landsmyndugleikar, ríkismyndugleikar og kommunur kunnu bert revsast fyri brot, sum verða gjørd í sambandi við virksemi, sum svarar til ella kann javnsetast við virksemi hjá privatum."*

Dátueftirlitið hevur ta fatan, at virksemið, ið ein kommuna fer undir sbrt. nýggju § 6 a, ikki svarar til ella kann javnsetast við virksemi hjá privatum, og at ein kommuna tí ikki kann revsast

fyri at seta upp vakmyndatól, uttan at hetta er gjørt í samráð við politiið, at víðarigeva upptøkur til onnur enn politiið ella at goyma upptøkur í meira enn 30 dagar.

Dátueftirlitið byggir hesa fatan á, at neyvt sama orðing um revsing verður nýtt í dátuverndarlógini, og tann vanliga fatanin er, at kommunur og almennir myndugleikar ikki kunnu sektast fyri brot á dátuverndarlógina.

Hinvegin, so tekur Dátueftirlitið undir við, at kommunur kunnu revsast fyri omanfyri nevndu brot, og mælir til, at ein áseting um hetta verður sett inn í vakmyndatólslógina.

Løgmálaráðið tekur undir við sjónarmiðinum hjá Dátueftirlitinum um, at yvirvøka við vakmyndatóli sbrt. § 6 a í uppskotinum ikki er at javnseta við virksemi hjá privatum.

Eftir at hava viðgjørt innkomnu ummælini og eftir at Løgmálaráðið hevur viðgjørt uppskotið nærri, er tað fyri Løgmálaráðnum greitt, at ætlanin við uppskotinum er ikki at víkja frá útgangsstøðinum um, at almennir myndugleikar ikki kunnu sektast fyri brot á løgtingslógina. Løgmálaráðið metir, at um útgangsstøðið hvat hesum viðvíkur skal broytast, er neyðugt við einari gjøllari og breiðari almennari umrøðu av, hvørt tað er ráðiligt og ynskiligt at víkja frá útgangsstøðinum á ávísum økjum, sum t.d. innan dátuvernd og yvirvaking við vakmyndatóli.

Ásetingin verður tó ikki broytt, men viðmerkingarnar til ásetingina tillagaðar. Tað verður sostatt framvegis ásett, at brot á ásetingar í uppskotinum verða revsað við sekt, og at feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

Etiska Ráðið vísir í ummæli sínum á tær avbjóðingar, sum yvirvøka við vakmyndatóli í almenna rúminum ber við sær. Etiska Ráðið vísir m.a. á, at etiskt viðkomandi spurningar eru, nær hóskandi javnvág er millum tryggleika fyri borgaran og rættin til privatlív, og hvussu stórt inntriv í privatlív borgaranna myndugleikar kunnu loyva sær. Etiska Ráðið viðmerkir, at núverandi lógaruppskot tykist vera skilagott avmarkað, og at ásetingar í uppskotinum hava stóran týdning fyri at verja borgarar ímóti óhóskandi inntrivum frá myndugleikum. Etiska Ráðið mælir staðiliga til, at tey næstu fimm árini verða nýtt at savna inn royndir á skipaðan hátt, soleiðis at tað kann staðfestast, hvørt yvirvøka hevur ta ynskiligu ávirkanina á fyribyrging og/ella uppkláring av brotsverkum ella ikki.

Løgmálaráðið ásannar, at innsavnan av persónupplýsingum frá vakmyndatólum er eitt inntriv í persónliga frælsi og privatlív borgarans. Tað er tí av stórum týdningi, at yvirvøkan er avmarkað, eins og atgongdin til upplýsingarnar og viðgerðin av persónupplýsingunum er skipað í lóg, so borgarin er vardur ímóti óneyðugum og óhóskandi inntrivum frá myndugleikum. Løgmálaráðið takkar Etiska Ráðnum fyri at lýsa avbjóðingarnar, sum yvirvøka við vakmyndatóli á almennum støðum ber við sær.

Føroya Politi vísir í ummæli sínum á, at Føroya Politi yvirskipað tekur undir við uppskotinum, sum hevur eina skynsama javnvág ímillum at økja um tryggleikan á útsettum støðum og rættindini hjá tí einstaka.

Føroya Politi tekur undir við landsstýrinum í, at vakmyndatól eru eitt amboð millum fleiri, sum skulu brúkast fyri at økja um tryggleikan í almenna rúminum. Føroya Politi tekur eisini undir við landsstýrinum í, at tað er týdningarmikið, at tað eisini verður arbeitt við at basa teimum trupulleikum, sum kunnu vera orsøkin til ótryggleikan. Hetta krevur eitt tvørgeiraligt samstarv og átøk, sum Føroya Politi fegin luttekur í saman við øðrum viðkomandi myndugleikum, undir

hesum kommunum, Almannaverkinum, heilsuverkinum, serliga psykiatriskum serfrøðingum osfr.

Hvat viðvíkur víðarigeving av upplýsingum til politiið, vísir Føroya Politi til viðmerkingarnar í uppskotinum, harav framgongur, at politiið kann fáa atgongd til upptøkur við rættarúrskurði sambært ásetingunum í rættargangslógini. Føroya Politi vísir á, at hetta ikki er í samsvari við § 6 a, stk. 3 í uppskotinum og serligu viðmerkingarnar til ásetingina. Føroya Politi vísir á, at um víðarigeving av upptøkunum krevur rættarúrskurð, eigur hetta at framganga í lógartekstinum.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at tað ikki eigur at vera nakar ivi um, á hvønn hátt og undir hvørjum umstøðum politiið kann fáa atgongd til upptøkur frá vakmyndatólum, sum verða sett upp sambært § 6 a, stk. 1 í uppskotinum. Viðmerkingarnar í lógaruppskotinum til ásetingina verða tí broyttar, soleiðis at tað ikki verður ivi um, at ein kommuna kann víðarigeva upptøkur til politiið til tess at kanna og avdúka álvarsom lógarbrot.

Kriminalitetskravið verður varðveitt. Tað vil siga, at politiið kann fáa atgongd til upptøkurnar, um talan er um upplýsingar, sum liður í at kanna og avdúka lógarbrot, sum hava eina revsirammu á minst 3 ár.

Føroya Politi vísir á, at tað framgongur av § 6, stk. 3 í uppskotinum, at tað einans er politiið, sum kann viðgera persónupplýsingar í samband við upptøkur, sum eru fevndar av stk. 1. Hetta er endurtikið í viðmerkingunum.

Føroya Politi tekur undir við at avmarka, hvør kann viðgera upptøkurnar. Um upptøkurnar skulu innganga í revsimál – sum í útgangsstøðinum er orsøkin til, at politiið biður um upptøkurnar – er tað tó ein fortreyt, at allir myndugleikarnir o.o., sum eru partar av revsimálum, eisini kunnu viðgera upplýsingarnar. Tað eru t.d. ákæruvald, dómstólar, verjar og kærumyndugleikar.

Føroya Politi mælir til, at § 6 a, stk. 3, 2. pkt. heldur verða orðað soleiðis: "Upptøkur, sbrt. stk. 1, kunnu viðgerast av øðrum enn politinum, um hetta er neyðugt í samband við ítøkilig revsimál."

Løgmálaráðið skal vísa á, at ætlanin við uppskotinum er ikki at avmarka viðgerð av upplýsingum í sambandi við revsimál. Tað verður mett av týdningi, at teir myndugleikar, sum eru partar av einum revsimál, fáa atgongd til neyðugu upplýsingarnar. Ásetingin verður tí broytt samsvarandi uppskotinum frá Føroya Politi.

Hvat viðvíkur revsiásetingini vísir Føroya Politi á, at § 10 verður broytt soleiðis, at revsast kann fyri brot á § 6 a, stk. 1, 3 og 4.

Føroya Politi vísir á útgangsstøðið í § 27, stk. 2 í revsilógini, sum hevur við sær, at almennir myndugleikar ikki kunnu revsast í sambandi við myndugleikaútinning. Um § 10, stk. 1 í vakmyndatólslógini skal víkja frá hesum útgangsstøðinum, eigur hetta at verða viðgjørt í uppskotinum.

Eftir at hava viðgjørt innkomnu ummælini og eftir at Løgmálaráðið hevur viðgjørt uppskotið nærri, er tað fyri Løgmálaráðnum greitt, at ætlanin við uppskotinum er ikki at víkja frá útgangsstøðinum um, at almennir myndugleikar ikki skulu sektast fyri brot á løgtingslógina.

Ásetingin verður tó ikki broytt, men viðmerkingarnar til ásetingina tillagaðar. Tað verður sostatt framvegis ásett, at brot á ásetingar í uppskotinum verða revsað við sekt, og at feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini. Ætlanin við uppskotinum er ikki at víkja frá útgangsstøðinum um, at almennir myndugleikar ikki skulu sektast fyri brot á løgtingslógina.

Kommunufelagið vísir í ummæli sínum á, at uppskotið leggur upp til eina heldur óvanliga fyrisitingarliga skipan, har tað er kommunan, sum skal eiga, seta upp og reka vakmyndatólini – men hetta kann bert gerast við loyvi frá politinum, og tað er einans politiið, sum kann brúka upptøkurnar. Samstundis er tað kommunan, ið hevur ábyrgdina av, at skipanin er í samsvari við lógina, og at teknisku loysnirnar eru nøktandi.

Kommunufelagið vísir á, at úrslitið er sostatt, at tann myndugleikin, sum hvørki sleppur at síggja ella nýta upptøkurnar, kortini fær ábyrgdina av teknisku skipanini og av lógligheitini av yvirvøkuni. Henda skipan heldur felagið ikki kann varðveitast. Fær kommunan ongar møguleikar at nýta upptøkurnar til egin endamál, so má hetta heldur vera ein uppgáva, ið verður lyft av landinum ella politinum einsamalt.

Kommunufelagið vísir á, at uppskotið ikki gevur kommunum nakra heimild at nýta upptøkurnar. Hetta hóast slík nýtsla í ávísum førum kundi verið viðkomandi. Talan kundi til dømis verið um eftirmeting av trygdarátøkum í sambandi við almenn tiltøk, fyribyrging av herverki, skipan av býarrúmum ella betring av ferðsluviðurskiftum.

Ein avmarkað heimild til slíka kommunala nýtslu kundi tryggjað, at íløgurnar í yvirvøkuskipanir komu einum breiðari skara til góðar. Felagið mælir til, at verður tað ein kommunal uppgáva at fáast við skipaða yvirvøku av almenna rúminum, so skal tað eisini vera møguligt at nýta upptøkurnar til onnur saklig kommunal endamál.

Løgmálaráðið skal vísa á, at tey viðurskiftir, sum Kommunufelagið vísir á, ikki verða mett at vera í samsvari við endamálið við uppskotinum. Endamálið við uppskotinum er at geva kommunum heimild at seta upp vakmyndatól fyri at fremja og økja um trygdina á støðum við vanligari ferðslu. Endamálið er ikki at geva kommunum heimild at yvirvaka økir við vanligari ferðslu, soleiðis at ein kommuna eitt nú kann samskipa almenn tiltøk á betri hátt ella betra um ferðsluviðurskiftini. Um ein kommuna ynskir at yvirvaka við vakmyndatóli fyri at fyribyrgja innbrotum, herverki ella líknandi, og kommunan í hesum sambandi ynskir at yvirvaka ognir hjá kommununi, so er heimild fyri hesum í galdandi løgtingslóg.

Yvirvøka av økjum við vanligari ferðslu við vakmyndatóli er eitt inntriv í rættin hjá einstaka borgaranum at ferðast frítt og eitt inntriv í privatlív borgarans. Tað er fyri at verja borgaran fyri óneyðugum inntrivi og óneyðugari yvirvøku, at avmarkingar verða gjørdar í, hvør hevur atgongd til upptøkurnar, og undir hvørjum umstøðum atgongd fæst til upptøkurnar.

Løgmálaráðið metir ikki grundarlag vera fyri at broyta uppskotið samsvarandi viðmerkingum frá Kommunufelagnum hvat viðvíkur treytum fyri at seta upp vakmyndatól, varðveitslu og striking av upptøkum.

Kommunufelagið vísir harumframt á, at íløgurnar til keyp og rakstur av yvirvøkuskipanum í ringan mun koma at standa í mát við tann avmarkaða týdning, sum upptøkurnar kunnu fáa í praksis.

Kommunufelagið vísir eisini á, at uppskotið áleggur kommunum fleiri umsitingarligar uppgávur, undir hesum truplar tøkniligar og løgfrøðiligar metingar. Kommunufelagið mælir m.a. til, at freistirnar fyri, nær nýggjar metingar skulu gerast, verða tiknar burtur ella munandi longdar.

Løgmálaráðið skal vísa á, at yvirvøka við vakmyndatóli mest sannlíkt ongantíð fer at bera til, uttan at tað hevur við sær figgjarligar og umsitingarligar avleiðingar fyri tær kommunur, sum velja at seta upp vakmyndatól. Umframt at lúka treytir, sum ásettar eru í galdandi lóggávu, og treytir, sum verða ásettar í uppskotinum, skulu treytir og krøv, sum ásett eru í dátuverndarlógini, vera lokin, tá talan er um viðgerð av persónupplýsingum og viðkvæmum persónupplýsingum.

Umsitingarligar og figgjarligar avleiðingar verða tí ikki mettar einans at standa av fyriliggjandi uppskoti, men eisini av lóggávu, sum er galdandi fyri viðgerð av persónligum upplýsingum og viðkvæmum persónupplýsingum.

Løgmálaráðið heldur, at tað er hóskandi, at tilmæli frá politiinum sambært § 6 a, stk. 2 í lógaruppskotinum verður endurskoðað eftir 2 ár. Hetta er fyri at tryggja, at vakmyndatól ikki eru uppsett longur, enn tað er sakligt grundarlag fyri at yvirvaka eitt øki við vakmyndatóli. Løgmálaráðið metir tí ikki, at freistin skal leingjast, men at spurningurin um freistin í § 6 a, stk. 2 skal vera longri, hóskandi kann verða tikin við, tá skipanin verður endurskoðað um fimm ár.

Kommunufelagið vísir harumframt á, at Løgmálaráðið eigur at kanna og taka støðu til, um ein skipan við hissini loyvum til støðuga yvirvaking í sambandi við stór tiltøk, almennar vitjanir, landsdystir o.a., eigur at verða loyvd.

Løgmálaráðið er ikki gjørt varugt við, at tørvur er á slíkari støðugari yvirvøku og Løgmálaráðið hevur ikki grundarlag fyri at halda, at tørvur er á heimild at loyva slíkari yvirvaking. Løgmálaráðið metir tí ikki, at grundarlag er fyri at seta inn slíka heimild í uppskotið.

Kommunufelagið vísir á, at tað tykist nakað ógreitt, undir hvørjum treytum politiið kann fáa atgongd til upptøkurnar. Felagið vísir á, at við atliti til rættartrygdina hjá borgarum eigur at verða ásett í lógini, at politiið bert kann fáa atgongd eftir vanligari mannagongd við rættarúrskurði. Hetta hevði tryggjað, at ein óheftur dómari tók støðu til, um treytirnar fyri at lata upptøkurnar vóru loknar.

Ein slík skipan hevði ikki verið til stórvegis ampa fyri løgregluna, men hevði hinvegin styrk álitið á og undirtøkuna fyri skipanini. Felagið mælir tí til at broyta uppskotið samsvarandi.

Løgmálaráðið skal vísa á, at Føroya Politi hevur gjørt vart við, at samsvar ikki er millum lógartekstin og viðmerkingarnar til ásetingina. Tað eigur ikki at vera ógreitt, undir hvørjum treytum politiið kann fáa atgongd til upptøkurnar.

Uppskotið verður tí broytt, soleiðis at tað greitt framgongur, at politiið kann fáa atgongd til upptøkur, tá talan er um lógarbrot við eini revsirammu á minst 3 ár. Løgmálaráðið metir, at neyðug atlit vera tikin til rættartrygdina hjá borgarum við ásetta kriminalitetskravinum.

Tórshavnar kommuna vísir í ummæli sínum á, at talan yvirskipað er um eitt gott og neyðugt stig fyri at økja um trygdina hjá borgarum, serliga í náttarlívinum, har trupulleikar við hóttandi atburði, rúsdrekka og harðskapi hava verið afturvendandi. Kommunan vísir á, at heimildin kann verða eitt virkið amboð til at skapa størri tryggleika og trivnað í býarlívinum, og stuðlar undir samstarvinum millum kommununa og løgregluna um fyribyrging av lógarbrotum.

Tórshavnar kommuna tekur undir við uppskotinum, men mælir til at víðka um ásetingina í § 6 a, stk. 3 í uppskotinum, soleiðis at upptøkur kunnu latast løgregluni, har tað sambært løgregluni er neyðugt fyri at kanna ella uppklára eitt brotsverk – eisini í førum, har revsiramman er undir 3 ár, eitt nú sambært § 244 um harðskap og § 291 um herverk. Tórshavnar kommuna vísir á, at mest vanligu lógarbrotini í býarlívinum eru brot á §§ 244 og 291 í revsilógini.

Løgmálaráðið skal vísa á, at yvirvøka við vakmyndatóli í almenna rúminum er eitt inntriv í frælsi og privatlív hjá einstaka borgaranum. Løgmálaráðið ásannar, at eitthvørt lógarbrot framt móti einum borgara er álvarsligt og órógvandi fyri einstaka borgaran, eisini tá talan er um harðskap eftir § 244 og herverk eftir § 291. Løgmálaráðið metir tó, at inntrivið, sum yvirvøka við vakmyndatóli er, má standa í mát við endamálið við inntrivinum. Tí metir Løgmálaráðið, at eitt kriminalitetskrav eigur at verða ásett, og at tað einans er í málum um serliga álvarsom lógarbrot, at upptøkur kunnu latast víðari.

Løgmálaráðið tekur tí ikki undir við at lækka kriminalitetskravið, soleiðis at upptøkur kunnu gevast víðari, um talan er um lógarbrot við revsirammu undir 3 ár.

Tórshavnar kommuna vísir á, at um løgreglan skal fara umvegis rættargangslógina fyri at fáa upptøkurnar, kann tað gerast munandi meira býrokratiskt og virka seinkandi, og at tað ikki er vist, at rætturin gevur heimild. Kommunan vísir á, at hetta kundi verið haldgóð grundgeving.

Løgmálaráðið tekur ikki undir við, at politiið kann fáa upptøkur beinleiðis frá kommununi, tá ið løgreglan metir tað vera neyðugt fyri at kanna ella avdúka eitt brotsverk, eisini um revsiramman er undir 3 ár.

Løgmálaráðið metir tað vera av týdningi, at tað greitt er ásett, nær og undir hvørjum umstøðum politiið kann fáa atgongd til upplýsingarnar. Av hesi orsøk er eitt kriminalitetskrav ásett, og Løgmálaráðið metir ikki orsøk vera til at broyta hetta í uppskotinum.

Løgmálaráðið skal vísa á, at serligu viðmerkingarnar til § 6 a, stk. 3 í uppskotinum verða tillagaðar, soleiðis at upptøkur kunnu latast politinum uttan rættarúrskurð, til tess at politiið kann kanna og avdúka álvarsom lógarbrot. Løgmálaráðið metir, at neyðug atlit verða tikin til rættartrygdina hjá borgarum við ásetta kriminalitetskravinum.

SSP-ráðgevingin setur í ummæli sínum sjóneykuna á nakrar tvístøður, sum út frá einum kriminologiskum og fyribyrgjandi sjónarhorni standast av uppskotinum. SSP-ráðgevingin vísir m.a. á, at tað eigur at verða definerað betur, hvat tað merkir at betra um trygdina í útsettum økjum í kommununi, og at eitt útgangsstøði eigur at vera áðrenn og eftirmeting aftaná.

SSP-ráðgevingin vísir m.a. á, at í einum lítlum samfelag er álit og felagsskapur av stórum týdningi, serliga er sosial eftirlit fyribyrgjandi og viðvirkar til trygd. SSP-ráðgevingin metir, at skrásetingarskipanin hjá politinum ikki gevur nøktandi grundarlag fyri eina neyva fakliga meting av slíkum økjum, vegna avmarkingar í journalskipanini. Sambært SSP-ráðgevingini eiga slíkar metingar at gerast í samráð við fleiri partar, sum t.d. borgarar, SSP økisbólkar og

onnur. SSP-ráðgevingin vísir eisini á, at metingin av, hvat eitt serliga útsett øki er, kann hava við sær stigmatisering av útvaldum økjum og møguliga borgarum.

Løgmálaráðið ásannar, at ongin ítøkilig greining er gjørd av, hvat er at meta sum eitt útsett øki í kommununi. Eitt øki, sum er merkt av harðskapi í størri mun ella í ávísum tíðarskeiðum á døgninum, kann vera serliga útsett og hava við sær, at borgarar kenna seg ótryggar at ferðast í økinum ávís tíðspunkt á døgninum. Tað er einstaka kommunan, sum ger hesa meting eftir tilráðing og upplýsingum frá politinum. Løgmálaráðið metir, at Føroya Politi hevur innlit og kunnleika at meta um hesi viðurskifti í Føroyum, og mett verður ikki, at grundarlag er fyri at broyta ásetingar í uppskotinum hvat hesum viðvíkur. Tað er onki í vegin fyri, at kommunan leitar sær ráðgeving frá øðrum stovnum, SSP økisbólkum og myndugleikum sum liður í at upplýsa málið og meta um, hvørt grundarlag er fyri at seta upp vakmyndatól.

SSP-ráðgevingin vísir á, at SSP fegin vil fáa upplýst, hvussu nógv politimál hava verið av persónfarligum kriminaliteti, har uppkláringararbeiðið ikki bar á mál, og tørvur tí hevur verið á yvirvøku.

Løgmálaráðið skal vísa á, at Løgmálaráðið ikki hevur hesi tøl. Tá ið skipanin skal endurskoðast um 5 ár, verður tað avgjørt viðkomandi at fáa slík tøl til vegar.

SSP-ráðgevingin mælir til heldur at seta tiltøk í verk at betra um ábyrgdarkenslu borgarans og styrkja um sosiala eftirlitið. SSP-ráðgevingin vísir á, at sum fyribyrging til ung, kunnu skipanir við náttarravnum og SSP styrkjast í sambandi við tiltøk, har rúsdrekka er uppií. Slík tiltøk eru t.d. festivalar.

Løgmálaráðið tekur undir við sjónarmiðnum hjá SSP-ráðgevingini um at seta í verk fyribyrgjandi skipanir so sum náttarravnar, og at styrkja SSP-ráðgevingina og SSP samstørvini. Løgmálaráðið metir ikki, at yvirvøka við vakmyndatóli í sjálvum sær er fyribyrgjandi, og tí er neyðugt at seta í verk aðrar fyriskipanir, sum krevja tvørgeiraligt samstarv.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið um at geva kommunum heimild at yvirvaka øki, sum er serliga útsett og verður nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli, hevur ikki fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur í sjálvum sær.

Tað er einstaka kommunan, sum ber útreiðslurnar av at fáa til vegar og seta upp vakmyndatól, og er tað einstaka kommunan, sum ber útreiðslurnar, sum hetta annars hevur við sær. Sostatt hevur uppskotið einans fíggjarligar avleiðingar fyri tær kommunur, sum seta upp vakmyndatól.

Mett verður, at tað verður eitt avmarkað tal av vakmyndatólum sum verða sett upp sambært heimildini í uppskotinum og mett verður tí ikki, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri stovnar hjá landinum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Tá ið ein kommuna setur upp vakmyndatól, er tað einstaka kommunan, sum hevur ábyrgdina av vakmyndatólinum og hevur ábyrgdina av, at yvirvøkan ikki stríðir ímóti lóggávu annars. Yvirvøka og viðgerð av persónupplýsingum í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli er fevnd av dátuverndarlógini, og er tað einstaka kommunan, sum er dátuábyrgdari og dátuviðgeri og sum skal tryggja, at mannagongdir og viðgerð er í samsvari við dátuverndarlógina.

Uppskotið hevur sostatt umsitingarligar avleiðingar fyri tær kommunur, sum seta upp vakmyndatól sambært ætlaðu heimildini.

Við uppskotinum verður ásett, at kommunur í samráð við og eftir tilmæli frá politinum, kunnu við vakmyndatóli yvirvaka øki, sum er serliga útsett og verður nýtt til vanliga ferðslu. Politiið skal í hesum sambandi viðgera møgulig uppskot frá eini kommunu og út frá eini politifakligari meting gera eitt tilmæli til kommununa. Uppskotið verður tí mett at hava ávísar umsitingarligar avleiðingar fyri politiið.

Tá ið vakmyndatól verður sett upp, skal tað fráboðast Dátueftirlitinum. Dátueftirlitið ger tá eina meting av, um yvirvøkan er í samsvari við dátuverndarlógina. Uppskotið verður sostatt mett at hava ávísar umsitingarligar avleiðingar fyri Dátueftirlitið.

Mett verður, at tað verða tær størru kommunurnar í landinum, sum fara at nýta heimildina, sum sambært uppskotinum verður ásett í løgtingslógina. Mett verður somuleiðis, at tað verður eitt avmarkað tal av vakmyndatólum, sum verða sett upp.

Tær umsitingarligu avleiðingarnar verða tí mettar at vera avmarkaðar og mett verður ikki, at talan verður um umsitingarligar avleiðingar, sum fara at hava við sær tørv á eyka arbeiðsorku fyri landsmyndugleikar og ríkismyndugleikar í Føroyum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið verður mett at hava jaligar avleiðingar fyri fyritøkur, ið selja vakmyndatól og veita tænastur, ið knýta seg at hesum.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið verður ikki mett í sjálvum sær at hava avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

Mett verður, at tað einans verða tær stóru kommunurnar í landinum, og í høvuðsheitum Tórshavnar kommuna, sum fara at nýta ætlaðu heimildina og sum fara at lúka treytirnar fyri at seta upp vakmyndatól at yvirvaka øki, sum er serliga útsett og verður nýtt til vanliga ferðslu.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar á økinum, ið lógaruppskotið fevnir um, og sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Hoyvíkssáttmálin er ikki viðkomandi fyri uppskotið.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Uppskotið verður mett at vera í samsvari við EMRS.

   Sambært grein 8 í EMRS hava øll rætt til, at privatlív og familjulív verða vird. Lógaruppskotið hevur við sær, at tað í ávísum førum og undir ávísum treytum verður heimilað kommunum at yvirvaka øki, ið verða nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli. Talan er sostatt um inntriv í rættin til privatlív. Mett verður tó, at orsøkin til yvirvøkuna, mannagongdirnar fyri nær yvirvøka kann fara fram við vakmyndatóli og kravið um skelting hava við sær, at talan er um inntriv, ið er avmarkað, sakligt og lýkur lutfalsmeginregluna og inntrivið verður tí mett at vera neyðugt.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Sambært løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli skulu privat og almennir myndugleikar sum við vakmyndatóli yvirvaka støð ella høli, sum vanlig atgongd er til, skelta ella á annan hátt gera vart við yvirvøkuna. Kommunur, sum seta upp vakmyndatól sambært ætlaðu heimildini, verða fevndar av kravinum um skelting. Í hesum sambandi skal m.a. havast í huga, at fólk, ið eru blind og sjónveik, eisini skulu verða gjørd varug við yvirvøkuna.

   Uppskotið verður annars mett at hava við sær sama inntriv fyri allar borgarar.

2.9. Markaforðingar
Tað eru ikki markaforðingar á økinum og mett verður ikki, at uppskotið kann elva til slíkar forðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Ásett verður, at brot á § 6 a, stk. 1, 3 og 4 verður fevnt av ásetingini um revsing í § 10, stk. 1 í løgtingslógini, og at brot á hesar greinar verður revsað við sekt.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ikki reglur um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki reglur um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Ásett er í galdandi løgtingslóg, at vakmyndatól, sum verða sett upp, skulu fráboðast Dátueftirlitinum. Kommunur, sum seta upp vakmyndatól eftir ætlaðu heimildini, skulu boða Dátueftirlitinum frá, tá vakmyndatól verða sett upp.

Harumframt er ásett, at almennir myndugleikar skulu eins og privat, sum við vakmyndatóli yvirvaka støð ella høli, sum vanlig atgongd er til, skelta ella á annan hátt týðiliga gera vart við yvirvøkuna.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið gevur kommunum undir ávísum treytum heimild at yvirvaka útsett øki, sum verða nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli.

Lógaruppskotið leggur annars ikki heimildir til landsstýrisfólkið ella stovn undir landsstýrinum.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Nei	Ja	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Ja	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1, nr. 1
§ 6 a í lógaruppskotinum gevur kommunum heimild at yvirvaka serliga útsett øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, við vakmyndatóli fyri at økja um trygdina í økinum. Avgerðin um at seta upp vakmyndatól skal gerast í samráð við politiið, og áðrenn kommunustýrið tekur avgerð, skal tilmælið frá politinum vera fingið til vegar.

Endamálið er at geva kommunum heimild at seta upp vakmyndatól at yvirvaka øki, har tørvur er á at fremja átøk fyri at økja um tryggleika. Tað kann vera eitt øki, sum er merkt av harðskapi, hóttandi atburði ella ófriði, sum tí kennist ótrygt hjá borgarum at ferðast í. Tað, at lógarbrot verða framd og at ávís øki eru merkt av tilburðum av lógarbrotum, kann gera tað ótrygt hjá einstaka borgaranum at ferðast í økinum. Slík heimild hevur sostatt eisini til endamáls at fyribyrgja lógarbrotum, sum gera tað ótrygt hjá borgarum at ferðast í ávísum økjum ávís tíðspunkt. Talan kann vera um øki, sum í ávísum tíðarskeiðum á døgninum eru ótrygg, har mett verður neyðugt at yvirvaka í avmarkaðum tíðarbilum, t.d. frá kl.23.00 til kl.06.00 hósdag til sunnudag, sum liður í at fyribyrgja hesum ótryggleika.

Gøta, vegur, pláss ella líknandi øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu skal skiljast eins og ásett í § 2 í løgtingslógini. T.e. at øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, fevnir um øki, sum ein og hvør frítt hevur atgongd til og kann vera á. Tað er ikki avgerandi, um t.d. gøtan er almenn ella privat, men um hon verður nýtt til vanliga ferðslu. Eins og ásett í verandi løgtingslóg, er ikki heimild við vakmyndatóli at yvirvaka inn í privat heim ella onnur privat øki, so sum bygningar og handlar hjá privatum.

At kommunur fáa heimild við vakmyndatóli at yvirvaka serliga útsett øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, hevur ikki við sær, at kommunur uttan víðari og uttan avmarkingar kunnu yvirvaka hesi øki við vakmyndatóli.

Yvirvøka ið vakmyndatóli á støðum við vanligari ferðslu er eitt inntriv í rættindi hjá tí einstaka til privatlív. Inntrivið skal standa í mát við endamálið. Tað er einans í teimum støðum, har minni inntrívandi átøk ikki eru nóg mikið fyri at økja um tryggleikan, at ein kommuna sambært uppskotinum kann seta upp vakmyndatól at yvirvaka serliga útsett støð við vanligari ferðslu.

Ásett verður, at ein kommuna í samráð við politiið og eftir tilmæli frá politinum kann seta upp vakmyndatól at yvirvaka øki við vanligari ferðslu.

Tað merkir, at áðrenn ein kommuna tekur avgerð um at seta upp vakmyndatól sambært uppskotinum, skal kommunan umrøða tørvin á yvirvøku við politiið. Politiið kann vegleiða kommununa og lata kommuni upplýsingar, sum kunnu takast við í avgerðina um uppseting av vakmyndatólum. Talan kann vera um upplýsingar um, hvussu nógv brotsverk eru framd í einum ávísum øki innanfyri eitt ávíst tíðarskeið, í hvørjum tíðarbili á døgninum brotsverk eru framd, og um politiið annars, grundað á eina politifakliga meting, metir grundarlag vera fyri við yvirvøku á staðnum.

Politiið kann harumframt í tilmæli sínum mæla frá, at eitt ávíst øki verður yvirvakað við vakmyndatóli, um tað eftir eini politifakligari meting ikki verður mett, at grundarlag er fyri at

seta upp vakmyndatól eitt ávíst øki ella mett verður, at endamálið við yvirvøkuni ikki kann røkkast við at seta vakmyndatólið upp.

Hóast tað við hesi áseting verður heimilað kommunum at seta upp vakmyndatól at yvirvaka øki við vanligari ferðslu fyri at fremja tryggleikan, og grundarlagið at viðgera persónupplýsingar, fevndar av dátuverndarlógini, fæst til vegar, er tað harumframt eitt krav, fyri at viðgerðin er lóglig, at viðgerðin er í samsvari við meginreglurnar í dátuverndarlógini, sum lýstar í nr. 1.2.2 í lógaruppskotinum. Tað er einstaka kommunan, sum er dátuábyrgdari og dátuviðgeri eftir dátuverndarlógini, og hevur ábyrgdina av, at yvirvøka við vakmyndatóli eru í samsvari við dátuverndarlógina.

Meginreglan um lógligheit, rímiligheit og gjøgnumskygni, sum ásett í § 7, stk. 1, nr. 1 í dátuverndarlógini ásetur meginregluna um proportionalitet og løggildi. Henda meginreglan hevur við sær, at viðgerðin ikki skal gera størri inntriv í rættindi hjá tí einstaka enn neyðugt er fyri at røkka endamálinum. Tað merkir, at vakmyndatól ikki skal taka upp meira enn tað, sum neyðugt er fyri at røkka endamálinum, og tað skal ikki taka upp í longri tíðarskeið, enn mett neyðugt fyri at røkka endamálinum. Tað verður sum útgangsstøði mett, at tíðaravmarkað yvirvøka við vakmyndatóli er minni inntrívandi enn støðug yvirvvøka við vakmyndatóli. Ein ítøkiliga meting skal gerast í hvørjum einstøkum føri.

Meginreglan hevur harumframt við sær, at ein meting í hvørjum einstøkum føri skal gerast av, um áhugin at yvirvaka vigar tyngri enn áhugin hjá tí einstaka í ikki at vera fyri yvirvøku. Harumframt skal ein meting gerast av, um endamálið kann røkkast við minni inntrívandi átøkum enn yvirvaking við vakmyndatóli.

Tað er harumframt eitt krav sambært § 7, stk. 1 í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli, at almennir myndugleikar skulu skelta ella á annan hátt týðiliga gera vart við yvirvøkuna, tá hendan fer fram. Tað vil siga, at tað eisini skal gerast vart við, hvar yvirvakað verður við vakmyndatóli, og í hvørjum tíðarbilum yvirvakað verður.

Meginreglan um endamálsavmarking sum ásett í § 7, stk. 1, nr. 2 í dátuverndarlógini ásetur, at persónupplýsingar bert kunnu savnast til nágreiniliga tilskilað og heimilað endamál og skulu ikki seinni viðgerast á ein hátt, sum er í ósamsvari við hesi endamál. Tað merkir, at upptøkur frá vakmyndatólum, sum eru sett upp við tí endamáli at fremja tryggleika í økinum, ikki kunnu nýtast til t.d. at kanna veðurskaðar, parkeringsviðurskifti ella um herverk er framt. Tað vil siga, at ein kommuna, t.e. starvsfólk hjá kommununi, t.d. ikki kunnu hyggja eftir upptøkum frá einum vakmyndatóli, sum er sett upp fyri at fremja tryggleikan, fyri at kanna um herverk er framt, og hvør møguliga hevur framt herverkið. At uppklára lógarbrot er ein uppgáva, sum politiið varðar av.

Meginreglan um dátuminimering, sum ásett í § 7, stk. 1, nr. 3 í dátuverndarlógini hevur við sær, at tá talan er yvirvøku við vakmyndatóli, eigur nøgdin av persónupplýsingum, sum verður viðgjørd, tað vil siga verður tikin upp, at vera so lítil sum møguligt fyri at røkka endamálinum við viðgerðini. Tað vil siga, um vakmyndatól verða sett upp, eigur vakmyndatólið bert at taka upp í tíðarskeiðum, tá ið tað verður mett neyðugt, og taka upp so lítið øki sum gjørligt, fyri at náa endamálinum.

Um eitt øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu, t.d. í miðbýnum í Tórshavn í tíðarskeiðinum frá kl. 23.00 til 06.00 hóskvøld til sunnumorgun er merkt av ófriði og harðskapi, sum ger tað ótrygt hjá borgarum at ferðast í økinum, men økið annars ikki er ótrygt at ferðast í, so kann

grundarlag vera fyri at yvirvaka økið við vakmyndatóli í ítøkiliga tíðarskeiðinum, tá økið er merkt av ótryggleika.

Meginreglan um goymslu, sum ásett í § 7, stk. 1, nr. 6 hevur við sær, at upptøkurnar frá vakmyndatólum ikki skulu goymast í longri tíðarskeið enn neyðugt við atliti at endamálinum við yvirvøkuni. Fyri nærri lýsing verður víst til viðmerkingarnar til § 6 a, stk. 4 í uppskotinum.

Meginreglan um integritet og trúnað, sum ásett í § 7, stk. 1, nr. 6 í dátuverndarlógini ásetur dátuábyrgdaranum skyldu, t.e. kommununi, at seta hóskandi tiltøk í verk at verja upplýsingarnar og tryggja, at meginreglurnar verða fylgdar. Meginreglan snýr seg um viðgerðartrygd.

Tað vil siga, at tað skulu vera leiðreglur fyri, hvussu atgongd fæst til upptøkurnar, undir hvørjum treytum atgongd er til upplýsingarnar, hvussu upptøkurnar verða goymdar, og hvussu tær verða strikaðar.

Einstaka kommunan skal harumframt tryggja, at útgerðin er trygg at nýta, at upptøkurnar eru goymdar í tryggum skipanum, og útgerðin tøkniliga er sett upp soleiðis, at viðgerðin er í samsvari við lógina og meginreglurnar í dátuverndarlógini.

Til § 6 a, stk. 2
Í *stk. 2* verður ásett, at tilmælið frá politinum er galdandi í tvey ár. Tað merkir, at ein kommuna innan tvey ár eftir at eitt vakmyndatól er sett upp sambært § 6 a, stk. 1 í lógaruppskotinum, í samráð við politiið skal gera eina meting av, um tørvur framvegis er á at yvirvaka økið við vakmyndatóli og fáa til vegar nýtt og dagført tilmæli frá politinum.

Verður framvegis mett at grundarlag er fyri yvirvøku við vakmyndatóli, og politiið framvegis mælir til, at eitt øki verður yvirvakað við vakmyndatóli, skal hetta fráboðast Dátueftirlitinum og dagførda tilmælið skal fráboðast og verða sent Dátueftirlitinum innan tvey ár.

Verða munandi broytingar gjørdar í yvirvøkuni, skal hetta sambært § 9, stk. 3 í løgtingslógini, fráboðast Dátueftirlitinum. § 6 a, stk. 2, í lógaruppskotinum hevur ikki við sær broytingar í eftirlitinum, sum Dátueftirlitið hevur við viðgerð av persónupplýsingum sambært § 8 í løgtingslógini og viðgerð av persónupplýsingum fevnd av dátuverndarlógini.

Er tilmælið ikki fingið til vegar innan tvey ár og fráboðað Dátueftirlitinum, er yvirvøkan við vakmyndatólinum at meta sum ólóglig, og vakmyndatólið skal takast niður.

Verður tað mett, at tað ikki longur er grundarlag fyri at yvirvaka eitt øki við vakmyndatóli, skal vakmyndatólið takast niður. Kemur eitt kommunustýri til hesa niðurstøðu, áðrenn tvey ár eru liðin, síðani vakmyndatólið varð sett upp, skal kommunustýrið taka vakmyndatólið niður alt fyri eitt.

Tá ið vakmyndatól verða tikin niður, skal tað fráboðast Dátueftirlitinum. Hetta soleiðis at Dátueftirlitið hevur eina dagførda skrá yvir vakmyndatól og til ber at tryggja endamálið við skránni, sum m.a. ger tað møguligt hjá politinum at kanna, um vakmyndatól eru í einum øki, sum er viðkomandi fyri kanningina av einum ítøkiligum máli.

Til § 6 a, stk. 3

Við uppskotinum verður ásett, at upptøkur við vakmyndatóli sambært § 6 a, stk. 1 í lógaruppskotinum, bert kunnu víðarigevast til politiið til tess at politiið kann kanna og avdúka álvarsom lógarbrot. Tað verður við uppskotinum sostatt gjørt greitt, at upptøkur ikki kunnu gevast víðari til onnur enn politiið, og at tað einans er politiið, sum kann viðgera persónupplýsingar í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli sambært § 6 a, stk. 1 í lógaruppskotinum.

Tá yvirvøka av persónum fer fram við vakmyndatóli, er talan um viðgerð av persónupplýsingum. Er talan um yvirvøku av møguligum lógarbrotum og møguligum revsiverdum viðurskiftum, er talan um viðgerð, av viðkvæmum persónupplýsingum.

At kanna og avdúka møgulig lógarbrot eru uppgávur, sum liggja hjá politinum. Við uppskotinum verður tí heimilað politinum at fáa atgongd til upptøkurnar. Tað verður við uppskotinum sostatt ikki givið kommunum og starvsfólkum í kommununi heimild at viðgera persónupplýsingar og viðkvæmar persónupplýsingar, fevndar av upptøkum við vakmyndatóli sambært § 6 a, stk. 1, í uppskotinum.

Harumframt verður tað í uppskotinum ásett, at tað einans er í teimum førum, tá talan er álvarsom lógarbrot, sum politiið kannar, at politiið kann fáa atgongd til upptøkur frá vakmyndatóli, sum eru sett upp sambært § 6 a, stk. 1 í uppskotinum. Við álvarsom lógarbrot meinast við lógarbrot, har revsiramman ikki er undir 3 ár. Talan kann vera um brotsverk ímóti lívi og likami (kap. 25 í revsilógini), kynslig brotsverk (kap. 24 í revsilógini) brotsverk ímóti persónliga frælsinum (kap. 26 í revsilógini) og alvandasom brotsverk (kap. 20 í revsilógini).

Í § 6 a, stk. 3, 2. pkt. í lógaruppskotinum verður ásett, at upptøkur sambært § 6 a, stk. 1 í uppskotinum kunnu viðgerast av øðrum enn politinum, um hetta er neyðugt í sambandi við ítøkilig revsimál. Onnur enn politiið er t.d. ákæruvaldið, verjar, dómstólar og kærumyndugleikar.

Tað er harumframt politiið, sum m.a. ger av, um upptøkur í sambandi við lógarbrot skulu almannakunngerast, og um tað sambært rættargangslógini er heimild fyri hesum.

Til § 6 a, stk. 4
Ásett verður í § 6 a, stk. 4 at upptøkur fevndar av § 6 a, stk. 1 í lógaruppskotinum, skulu strikast í seinasta lagi 30 dagar eftir upptøkuna.

Meginreglan um goymslu, sum ásett í § 7, stk. 1, nr. 6 í dátuverndarlógini hevur við sær, at upptøkurnar frá vakmyndatólum ikki skulu goymast í longri tíðarskeið enn neyðugt við atliti at endamálinum við yvirvøkuni.

Við lógaruppskotinum verður ásett, at upptøkur við vakmyndatóli, sum ein kommuna fremur við heimild í § 6 a, stk. 1 í lógaruppskotinum, skulu strikast í seinasta lagi 30 dagar eftir upptøkuna. Talan er um 30 kalendaradagar. Upptøkur við vakmyndatóli sambært § 6 a í lógaruppskotinum verða við uppskotinum ikki fevndar av ásetingini í § 8, stk. 3 í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli um frávik frá freistini upp á 30 dagar. Dátuábyrgdarin, t.e. kommunan, kann sostatt ikki goyma upptøkur longri enn 30 dagar.

Tað vil siga, um møgulig lógarbrot ella slóðir, sum kunnu hava týdning fyri kanningararbeiðið hjá politinum eru á upptøkum frá vakmyndatóli, sum er sett upp við heimild í § 6 a í

lógaruppskotinum, skal politiið tryggja sær upptøkurnar innan 30 dagar. Politiið hevur ikki skyldu at strika upptøkur eftir 30 dagar.

Einstaka kommunan, sum setur upp vakmyndatól sambært § 6 a í lógaruppskotinum, skal tí tryggja, at upptøkur verða strikaðar eftir 30 dagar. Hetta kann t.d. gerast við at seta skipanina tøkniliga upp soleiðis, at upptøkur verða strikaðar sjálvvirkandi í seinasta lagi 30 dagar eftir upptøkuna.

Til § 6 a, stk. 5
Ásett verður, at tað er einstaka kommunan, sum setir upp vakmyndatól sambært § 6 a, stk. 1 í lógaruppskotinum, sum er dátuábyrgdari.

Í § 6, nr. 6 í dátuverndarlógini er ásett, at ein dátuábyrgdari er *"Ein likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ein almennur myndugleiki, ein stovnur ella ein onnur eind, sum eina ella saman við øðrum ger av, til hvørji endamál og við hvørjum hjálpitólum persónupplýsingar kunnu viðgerast."*

Fyri at ongin ivi skal vera um, hvør dátuábyrgdari er, verður hetta ásett í løgtingslógini.

Til § 1, nr. 2
Ásett er í § 9, stk. 1 í løgtingslógini, at Dátueftirlitið hevur eftirlit við viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram sambært § 8 í løgtingslógini.

Við lógaruppskotinum verður ásett, at Dátueftirlitið hevur eftirlit við viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram sambært § 6 a í lógaruppskotinum.

Eftirlitið, sum Dátueftirlitið hevur við, um myndugleikar viðgera persónupplýsingar í samsvari við dátuverndarlógina, verður ikki broytt. Tað verður sostatt við uppskotinum gjørt greitt, at viðgerð, sum fer fram sambært § 6 a í lógaruppskotinum, eisini er fevnd av eftirlitinum hjá Dátueftirlitinum.

Dátueftirlitið hevur ikki eftirlit við, um løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli verður hildin. Dátueftirlitið kann tó vegleiða um dátuvernd í sambandi við yvirvøku við vakmyndatóli. Í sambandi við at vakmyndatól sambært § 9, stk. 2 í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli verða fráboðað, ger Dátueftirlitið m.a. eina proportionalitetsmeting av, um yvirvøkan er í samsvari við dátuverndarlógina.

Eftirlit við, um løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli verður hildin, liggur hjá politinum eins og tað er eftir galdandi lóg. Tað vil siga, um ein gerst varugur við, at eitt vakmyndatól er sett upp í ósamsvari við løgtingslógina, er hetta eitt brot, sum skal meldast til politiið.

Til § 1, nr. 3
§ 10 í løgtingslógini inniheldur reglur um revsing.

Við uppskotinum verður ásett, at brot á § 6 a, stk. 1, 3 og 4 verður fevnt av ásetingini um revsing í § 10, stk. 1 í løgtingslógini, og at brot á hesar greinar verður revsað við sekt.

Ásett er í galdandi løgtingslóg, at tað er revsivert at bróta kravið um skelting í § 7, stk. 1 og at bróta fráboðanarskylduna, sum ásett í § 9, stk. 2 og 3. Vakmyndatól, sum verða sett upp við heimild í § 6 a í uppskotinum, verða fevnd av kravinum um skelting og fráboðan, og verður

tað somuleiðis revsivert at bróta hesi krøv, tá talan er um vakmyndatól, sum verða sett upp við heimild í § 6 a í uppskotinum.

Ásett er í § 10, stk. 5 í galdandi løgtingslógini, at feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

Í mun til almennar myndugleikar er tað ein alment galdandi regla í § 27, stk. 2 í revsilógini, at almennir myndugleikar ikki kunnu sektast fyri brot á lóggávu, um hetta er í sambandi við myndugleikaútinnan. § 27, stk. 2 ásetur sostatt, at *"Landsmyndugleikar, ríkismyndugleikar og kommunur kunnu bert revsast fyri brot, sum verða gjørd í sambandi við virksemi, sum svarar til ella kann javnsetast við virksemi hjá privatum"*. Hetta verður ikki broytt ella vikið frá við hesum uppskotinum.

Til § 2
Ásett verður, at skipanin við yvirvøku við vakmyndatóli av útsettum økjum við vanligari ferðslu skal endurskoðast um 5 ár.

Yvirvøka við vakmyndatóli í almenna rúminum er eitt inntriv í frælsið hjá tí einstaka at ferðast frítt og eitt inntriv í rættin hjá tí einstaka til privatlív. Tað er tí av týdningi at endurskoða hesa skipan fyri at tryggja, at skipanin riggar sum ætlað, at skipanin ikki verður nýtt í størri mun enn neyðugt, og at skipanin ikki verður nýtt í staðin fyri at seta onnur átøk í verk fyri at fremja tryggleikan og fyribyrgja lógarbrotum, sum gera tað ótrygt at ferðast í økinum.

Talan er harumframt um eina nýggja skipan við yvirvøku við vakmyndatóli, og talar tað fyri, at slík skipan verður endurskoðað.

Til § 3
Áseting um gildiskomu.

Løgmálaráðið, 28. novembur 2025

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Brotsfrøðifelag Føroya
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Dátueftirlitinum
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Etiska Ráðnum
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Føroya Politi
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Kommunufelagnum
Fylgiskjal 7: Ummæli frá SSP-ráðgevingini
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Tórshavnar kommunu